## Budam í Sjónleikarhúsinum

Leygarkvøldið kl. 21 verður stór konsert í Sjónleikarhúsinum í samband við at nýggja fløgan hjá Budam, "Stories of devils, angels, lovers and murderers," kemur út. Har vera ikki færri enn tíggju tónleikarar á palli í senn. Teir vera, umframt Budam sjálvan, Magnus Johannessen, Rógvi á Rógvu, Mikael Blak, Kim Hansen, Nikolas Kapnas, Ólavur Olsen, Heini Ragnarson, Ása Wraae Olsen og Margreta á Rógvu. Fyri kortum spældi Budam á Spot festivalinum í Danmark, og her gav Gaffa honum fimm út av seks møguligum stjørnum fyri framførsluna á festivalinum. Budam spældi annars á bæði Asfalt og G! Festivalinum í fjør.




## Grønland keypir partabrøv

Tað er ikki óhugsandi, at grønlendska heimastýrið fer at keypa tey partabrøvini í flogfelagnum Air Greenland, sum SAS ætlar sær at selja. SAS eigur 37,5 prosent av partapeninginum í Air Greenland, men Hans Enoksen, landsstýrisformaður, sigur við útvarpið í Nuuk, at heimastýrið vil fyrst hava at vita, hvat partabrøvini eru verd. Heimastýrið eigur longu part í Air Greenland, men vil fegið hava størri ávirkan á felagið.

# Burtur við »Fólksins ogn«

**Strategibólkurin fyri »Tilfeingi« hevur mong tilmæli í sínari frágreiðing um, hvussu Føroyar gerast eitt av heimsins fremstu londum í 2015. Eitt teirra er at strika orðingina »Fólksins ogn« og í staðin nýta vendingina »Landsins ogn«**

VISJÓN 2015

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Ein stórur vansi innan framleiðslu av fiskavørum hevur verið, at framleiðsluorkan hevur verið ov stór í mun til framleiðsluvirðið. Hetta hevur so aftur ført við sær ein sea høgan framleiðslukostnað.*

*Mynd: Tilvildarliga vald*

Fiskivinnan, sum er okkara høvuðsvinna, fær sum vera man nógva umrøðu í arbeiðsbólkinum fyri tilfeingi.

Fyri tað fyrsta roknar bólkurin við, at talan í framtíðini fer at verða um fáar eindir innan fiskivinnuna. Ikki tí, at tað er eitt endamál í sjálvum sær við fáum eindum, men er ein fyritreyt, ið fiskivinnan má halda seg til, og sum eitt og hvørt mál verður treytað av.

Bólkurin mælir tí til, at allar forðingar fyri smidligari tillaging á økinum verða tiknar burtur, soleiðis at vinnan kann verða rikin við fáum eindum.

Eftir at hava viðgjørt fiskivinnulóggávuna, kemur bólkurin við fylgjandi tilmælum um broytingar:

- Kravið í lógini um vinniligan fiskiskap, at virksemi skal vera um alt landið, verður burturtikið
- Almenna kravið um, at tilfeingisvinnur í fyrstu atløgu skulu vera arbeiðsskapandi, verður burturtikið
- Flotin skal hava nógv betri umstøður til tøkniliga tillaging enn í dag, og avmarkandi krav til støðd á fiskiskipum skal strikast
- Geva fiskivinnum betri møguleikar at laga seg til framleiðslu og meirgóðsking
- Krøv, ið forða fyri at flyta fiskiføri millum vinnuøki, verða endurskoðað og burturtikin, har ið til ber
- Útróðrarflotin skal býtast í tveir partar – ein til vinnu og ein til ítriv
- Krøv, ið forða fyri flyting av veiðiorku til og úr »føroyskum« vinnuøki, verða endurskoðað og burturtikin, har ið til ber.

### Fleiri kanningar

Ein stórur vansi innan framleiðslu av fiskavørum hevur verið, at framleiðsluorkan hevur verið ov stór í mun til framleiðsluvirðið. Hetta hevur so aftur ført við sær ein sea høgan framleiðslukostnað.

Hetta er fyri ein stóran part studningunum í vinnuni fyri at takka, og tí verður mælt til, at teir studningar, sum framvegis eru galdandi, verða tiknir burtur. Hartil skal vinnan tillaga seg soleiðis, at lutfallið millum framleiðsluorku og framleiðsluvirði verður nøktandi.

Men hetta er kortini ikki nóg mikið. Ein sera stórur trupulleiki seinastu mongu árini hevur verið ósemjan millum granskarar, myndugleikar og vinnuna um, hvussu stórir fiskastovnarnir eru, og hvussu nógv er ráðiligt at fiska av hvørjum stovni.

Fyri at samansjóða hesar ymsu meiningar á frægasta hátt verður mælt til, at fiskirannsóknir og fiskigransking verður trífaldað. Eisini skulu fiskiskipini dragast meiri inn í rannsóknirnar við at hagtøl og annað í samband við eftirlit verða munandi meiri útgreinað, samstundiks sum hesi kunnu gerast grundarlag undir rannsóknararbeiðinum.

Mælt verður til, at tvey rannsóknarskip verða útvegað aftrat, og at orkan, sum í dag verður nýtt til rannsóknararbeiði, verður trífaldað eins og roknast má við, at kostnaðurin fylgir hesum.

Samstundis er tað tó neyðugt, at vinnan sjálv sær tað neyðuga í hesum og er við til at fíggja rannsóknararbeiðið saman við tí almenna. Eisini verður nevnt, at granskingin er avgerandi fyri okkara rættindum sum strandaland at fiska í Norðuratlantshavi, men her verður kortini ikki nevnt eitt orð um søguligu rættindini, sum kortini viga tyngst í so máta.

Eitt annað, sum strategibólkurin finst at, er orðingin í fiskivinnulógini, »fólksins ogn«. Sagt verður í frágreiðingini: »Orðingin »fólksins ogn« hevur mangan nervað almenna kjakið, og onkuntíð hevur spurnartekin verið sett við, um tað almenna hevur fríar heimildir at virka og taka avgerðir um tilfeingið grundað á hesa orðing. Hesin ivi verður burtur, um orðingin verður broytt til »landsins ogn««.

### Tiltøk neyðug

Fiskivinnupolitikkurin hevur í mong ár miðað ímóti at avmarka talið á loyvum og hetta hevur í stóran mun ført við sær, at loyvini eru savnað meiri og meiri á fáum hondum. Hetta hevur ført við sær, at tað hevur verið trupult hjá nýggjum kreftum at sloppi framat.

Og hesum verður mælt til at byrgja upp fyri. Og tað verður á besta hátt gjørt við at selja fiskirættindini javnan, og at ognarrætturin varir í avmarkað tíðarskeið. Við øðrum orðum ein loyvisbanka. Bólkurin hevur eisini okkurt hugskot um, hvussu hetta kundi verið gjørt. Bólkurin sigur:

»Í stuttum verður mælt til at seta í verk hesi tiltøk fyri at fáa varandi tilfeingisrentu, ið ber seg og fyri at gera sum minst skaða á umhvørvið:

- Allarbeinleiðis studningsskipanir skulu støðugt minka
- Munandi størri fíggjarlig orka skal verða tøk til gransking og fiskirannsóknir. Vinnan er beinleiðis við í at fáa hesa orku til vega
- Fiskirannsóknir og gransking skulu verða náttúrligur partur av vanligum fiskiskapi
- Lógargrundarlag skal tryggja, at vinnan útflýggjarmyndugleikum tilfar til at styrkja vitanina um fiskastovnar og veiðiorku
- Sett verður í verk nýggj skipan fyri sølu av fiskirættindum, sum skal tryggja betri atgongd og betri framleidni (produktivitet)

Niðurstøðan er, at skipan eigur at verða sett í verk, sum hevur við sær regluliga sølu av rættindum. Ein slík skipan fer at tryggja landinum besta inntøkur, og støddin á somu inntøkum er beinleiðis knýtt at tilfeingisrentuni, sigur strategibólkurin fyri tilfeingi um framtíðar fiskivinnupolitikk.